


## Bjargaði tveimum brotsspørkum

Finski málmaðurin Jussi Jaaskelainen var høvuðspersónurin, tá ið enska felagið Bolton í gjár vann 1-0 ímóti Blackburn. Ivan Campo skoraði málið hjá Bolton, men tað var ikki minst Jaaskelainen, sum syrgdi fyri sigrinum. Í móti endanum av dystinum fekk Blackburn tvey brotsspørk innanfyri tríggjar minuttir, og báðu ferðirnar bjargaði Jaaskelainen. Fyrst royndi Benni McCarthey seg og síðani Jason Roberts, men tað segði tað sama – finski málmaðurin bjargaði.

## Schevchenko fekk hol á

Ukrainski álopsspælarin hjá Chelsea skoraði umsíðir fyri nýggja felagið hjá sær, tá ið Chelsea spældi ímóti Portsmouth leygardagin. Schevchenko, sum hevur havt trupult við at finna málið seinnastu nógvu dystirnar, legði Chelsea fram um 2-0. Týski Michael Ballack fekk eisini hol á sína málskjóting, tá ið hann økti upp í 2-0. Porstmouth minkaði í seinna hálvleiki, men Chelsea helt fast um sigurin og liggur nú numar tvey í Premier League.

Skála-VB/Sumba 1-1 (1-0):

# Javnleikurin størsti sigurin í ár

*Skála*

*VB/Sumba*

**VB/Sumba fekk eitt stig úr dystinum, og tað var nóg mikið til at tryggja teimum eitt ár aftrat í deildini. Dysturin var tættur og spennandi, Skála var omaná men VB/Sumba stríddi seg til javnleik**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Skála hevði onki at spæla fyri. VB/Sumba hevði alt at spæla fyri. Tað var høvuðsmunurin á liðunum báðum, sum fóru á vøllin á Skála leygardagin. Men hesin munur sást tó ikki aftur á vøllinum. Bæði liðini stríddu manniliga og javnleikur var helst rætta úrslitið, tá saman um kom, hóast Skála var oman á stórar partar av dystinum.




*VB/Sumba javnaði í seinna hálvleiki, og so gjørdist javnleikurin til ársins størsta sigur*

### Tilvildin setti hol á

Skála sat oman á allan fyrra hálvleik. Teir royndu eisini at trýsta VB/Sumba og finna okkurt hol í verjuni, men tað var trupult. Stórur partur av hesum skal síggjast aftur í tí, at VB/Sumba verjan hevði skipað seg við sweepara.

Hetta gjørdi liðið eisini seinast, tá teir spældu móti NSÍ og vísir hetta seg at riggað væl. Hin parturin av orsøkini til vantandi málmøguleikar til Skála var, at teir vóru ov grammir. Ferð aftan á ferð rann Skála seg í rangstøðu, og annars var tað oftani seinasta sendingin, sum vantaði, fyri at teir av álvara sluppu framat.

Tí var tað rættiliga symptomatiskt fyri dystin, at málið sum Skála trýsti so nógv eftir at fáa, kom eftir ein deyðbólt, sum av reinari tilvild endaði í netinum.

Skála fekk eitt fríspark miðskeiðis millum miðjuna og brotsteigarmarkið. Levi Hansen leggur bóltin niðan móti brotsteiginum. Bólturin støkkur einaferð niður í svørðin, men ongin tekur hann, og so støkkur hann uppaftur einaferð har heldur ongin tekur bóltin, og áðrenn nakar visti av, lá bólturin í netinum aftan fyri Marcin Dawid.

Eitt serstakliga tilvildarligt mál, sum fekk Skálaviðhaldsfólkini at smílast og frøðast, men sum sveið hjá suðuroyingum, tí hatta átti ikki at komið fyri.

### Aftursvar

Leiðslan helt sær til hálvleiks og eisini eitt korter inn í seinna hálvleik við. Tá megnaði VB/Sumba at svara aftur. Tá høvdu tingini riggað betur hjá suðuroyingum eina løtu, og tí var tað helst ikki av eini leið, at teir javnaðu tá.

Eitt innlegg varð sent inn fyri og við handaru stong stóð Jón Krosslá Poulsen. Hann fekk tíð at leggja bóltin niður, áðrenn hann smekkaði hann hart inn við handaru stong, til ovurhondsstóra frøði hjá suðuroyingum.

Merkisvert var annars at hefta seg byrjunaruppstillingina hjá Skála. Bjarni Jørgensen, Alexandur Johansen og Pauli G. Hansen byrjaðu allir á beinkinum, men hesir komu allir inn í seinna hálvleiki. Tá riggaði eisini betri hjá Skála enn tað gjørdi í fyrra hálvleiki, men kortini fekk VB/Sumba javnað, tá umleið eitt korter var spælt av seinna hálvleiki.

### Yvirlivingin ein veruleiki

Fleiri mál enn hesi bæði komu ikki í dystinum. Ikki tí, bæði liðini royndu at gera sítt til at vinna dystin, men meiri spurdist ikki burtur úr enn tað sama.

Tískil endaði dysturin við at liðini býttu stigini sína millum. Men javnleikurin leygardagin er uttan iva størsti sigurin hjá VB/Sumba í ár. Teir hava nú varðveitt sæti í bestu deildini minst eitt ár aftrat og tað er ikki yvir at dylja, at hetta hevur ovurhondsstóran týdning fyri fótbóltin í Suðuroynni.

Framman undan hevur árið í ár roynst stak illa hjá hinum vaksnamannadeildunum, og hevði besta liðið úr oynni endaði í 1. deild, hevði tað verið steinur oman á byrðu.

Trupult er at ímynda sær, at Suðuroyggin ikki hevði verið umboðað í landsins bestu deild, men tað sleppa vit nú undan at gera, tí yvirlivingin er ein veruleiki.

## Sum at vinna FM

**Gleðin var øgilig á Skála í gjár, tá Lassin Isaksen bríkslaði fyri seinastu ferð. VB/Sumba hevur tryggjað sær enn eitt ár í bestu deildini og Súni úr Hørg heldur, at tað var sum at vinna FM**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*

Rómurin á Skála var ikki til at fara skeivur av. Á seinasta leikdegi tryggjaðu suðuroyingar sær enn eitt ár í Formuladeildini, og verjuleikarin hjá VB/Sumba, Súni úr Hørg, heldur at tað var sum at vinna FM.

– Hetta var fantastiskt. Málið seinastu dystirnar hevur bara verið at yvirliva, og tá er tað ótrúliga stuttligt at tað eydnast. Tað er akkurát sum at vinna FM, flennir Súni úr Hørg.

Spurdur um VB/Sumba er tað rætta av teimum trimum botnliðunum, sum skuldi yvirliva, sigur Súni úr Hørg, at tað má stigatalvan svara fyri.

– Liðið hevur verið nógv skert í ár í mun til áður, og tað er øgiliga trupult at svara fyri, hvørt vit eru betri egnaðir enn hini, men eg haldi stigatalvan svarar fyri seg, sigur Súni úr Hørg.

– Vit hava verið rættiliga svingandi í ár. Teir dystir, vit hava spælt væl, hava vit riggað væl sum eitt lið. Men so hava tað eisini havt dystir, har alt hevur raplað saman hjá okkum.

Dysturin leygardagin var eitt dømi um ein dyst, har tað riggaði væl hjá VB/Sumba.

– Tað var ein rættiliga spennandi dystur, har Skála eisini gav alt teir áttu. Fyrri hálvleikur gekk onki serligt og ongin okkara spældi væl. Seinni hálvleikur riggar munandi betur og vit fáa skapt eitt trýst eitt løtuna har vit so eisini fáa eitt mál, greiðir Súni úr Hørg frá, sum saman við VB/Sumba aftur verður at síggja í Formuladeildini komandi kappingarár.